# Heimsmeistarin var sjey sekund frammanfyri

**INNIRÓÐUR** Sverri Sandberg Nielsen vann heimsmeistaraheitið í farnu viku. Um vikuskiftið gjørdist hann óalmennur føroyameistari

Uni Holm Johannesen

Síðsta vikuskiftið vann Sverri Sandberg Nielsen heimsmeistaraheitið í bólkinum dreingir 17 til 18 ár. Leygardagin gjørdist hann óalmennur føroyameistari í kappingini »Opin bólkur tungvekt« hjá monnum.

Sverri Sandberg Nielsen var góð sjey sekund framman fyri nærmasta kappingarneytan.

Anny Maria Davidsen, sum luttók í heimsmeistaraskapinum síðsta vikuskiftið, varð fremst í kappingini »Opin bólkur tungvekt« hjá kvinnum. Tíðin var 6:58.9.

Umframt tað, vann hon gull í stafettrógving við Gongurálvi.

Havnar Róðrarfelag skipaði um vikuskiftið fyri óalmennari FM-kapping í innisóðri. Tað er framvegis eingin skipa kapping um føroyameistaraheitið í inniróðri í Føroyum.

*uni@sosialurin.fo*






*Heimsmeistarin í inniróðri, Sverri Sandberg Nielsen, var góð sjey sekund framman fyri nærmasta kappingarneytan*

*Anny Maria Davidsen, varð fremst í kappingini »Opin bólkur tungvekt« hjá kvinnum*

## Úrslit frá óalmenna FM í inniróðri 2011:

**OPIN BÓLKUR TUNGVEKT, 2000 M:**

| | 500 m | 1000 m | 1500 m | 2000 m |
|---|---|---|---|---|
| 1. Sverri Sandberg Nielsen | 1:30.6 | 3:03.9 | 4:37.4 | 6:07.7 |
| 2. Martin Berg | 1:29.3 | 3:01.4 | 4:36.4 | 6:14.6 |
| 3. Símun Svartá | 1:33.4 | 3:09.2 | 4:46.9 | 6:25.7 |

**OPIN BÓLKUR TUNGVEKT, KVINNUR/GENTUR, 2000 M:**

| | 2000 m |
|---|---|
| 1. Anny Maria Davidsen | 06:59.8 |
| 2. Annetta Cecilia Eidesgaard | 07:27.9 |
| 3. Kirstin Sigurðsdóttir | 07:29.0 |

**OPIN BÓLKUR LÆTTVEKT, 2000 M:**

| | 500 m | 1000 m | 1500 m | 2000 m |
|---|---|---|---|---|
| 1. Dánjal Martin Hofgaard | 1:36.6 | 3:13.5 | 4:51.5 | 6:27.4 |
| 2. Beinir Danielsen | 1:37.8 | 3:16.1 | 4:56.7 | 6:35.1 |
| 3. Oyvind Lutzen | 1:37.8 | 3:17.4 | 4:59.3 | 6:37.3 |

**OPIN BÓLKUR LÆTTVEKT, KVINNUR/GENTUR, 2000 M**

| | 500 m | 1000 m | 1500 m | 2000 m |
|---|---|---|---|---|
| 1. Kirstin Clementsen | 1:54.5 | 3:50.4 | 5:46.4 | 7:41.6 |
| 2. Karina Petersen | 1:53.2 | 3:50.1 | 5:48.9 | 7:46.6 |
| 3. Hildigunn Niclasen | 1:56.1 | 3:54.4 | 5:53.4 | 7:55.9 |

**MENN/DREINGIR, 17 TIL 18 ÁR, 2000 M**

| | 500 m | 1000 m | 1500 m | 2000 m |
|---|---|---|---|---|
| 1. Grímur Sundstein Petersen | 1:34.0 | 3:10.5 | 4:49.8 | 6:29.7 |
| 2. Ingmar á Løgmansbø | 1:37.5 | 3:17.2 | 4:55.7 | 6:40.0 |
| 3. Tóri Jacobsen | 1:42.8 | 3:26.3 | 5:10.6 | 6:54.2 |

**KVINNUR/GENTUR, 17 TIL 18 ÁR, 2000 M**

| | 500 m | 1000 m | 1500 m | 2000 m |
|---|---|---|---|---|
| 1. Maria Dahl | 1:58.7 | 4:05.6 | 6:14.0 | 8:18.9 |

**LIÐKAPPING, KVINNUR, 3000 M:**

| | 750 m | 1500 m | 2250 m | 3000 m |
|---|---|---|---|---|
| 1. Kirstin Clementsen | 4:46.8 | 7:28.0 | 10:00.9 | 12:27.5 |
| Hildigunn Niclasen | | | | |
| Albjørg Joensen | | | | |
| Kristina Sørensen | | | | |
| Anna Maria Davidsen | | | | |
| Jónvá Jónsdóttir | | | | |

**LIÐKAPPING, MENN, 3000 M:**

| | 750 m | 1500 m | 2250 m | 3000 m |
|---|---|---|---|---|
| 1. Brestir Mikkelsen | 2:50.7 | 5:08.7 | 7:33.9 | 9:57.7 |
| Jóhan Gudjónson | | | | |
| Sámal Kristiansson | | | | |
| Brandur Jógvanson | | | | |
| Mækir Í. Jákupsstovu | | | | |
| Christian Dahl | | | | |

**KVINNUR/GENTUR, 15 TIL 16 ÁR, 2000 M**

| | 500 m | 1000 m | 1500 m | 2000 m |
|---|---|---|---|---|
| 1. Eyð Fróðadóttir | 2:03.0 | 4:17.2 | 6:33.3 | 8:43.5 |

**MENN/DREINGIR, 15 TIL 16 ÁR, 2000 M**

| | 500 m | 1000 m | 1500 m | 2000 m |
|---|---|---|---|---|
| 1. Torstein Brattaberg | 1:40.3 | 3:23.0 | 5:07.0 | 6:46.9 |
| 2. Hallur Nattestad | 1:44.3 | 3:29.9 | 5:14.7 | 6:55.2 |
| 3. Hjalgrím Davidsen | 1:44.0 | 3:33.8 | 5:23.8 | 7:11.8 |



*Clayton Soares verður aftur at siggja í bestu føroysku fótbóltsdeildini*

*Savnsmynd: Álvur Haraldsen*

# Tríggir útlendingar til 07 Vestur

**FÓTBÓLTUR** Fýra útlendingar, sum fyrr hava roynt seg í føroysku landskappingini, hava skrivað undir sáttmála við 07 Vestur

Uni Holm Johannesen

Clayton Soares, Tamba Yarjah og Badara Diedhiou spældu í føroysku landskappingini í 2009. Undan kappingarbyrjan í fjør fóru teir av landinum, men nú eru teir aftur til reiðar. Málsetningurin er greiður. Teir ætla sær at hjálpa 07 Vestur at varðveita sætið í bestu deildini.

Jógvan Hendrik Samuelsen er venjari hjá 07 Vestur. Hann váttar, at teir hava skrivað undir sáttmála, sum knýtir teir at felagnum komandi kappingarár.

– Vit hava fimm útlendingar í hópinum, og restin eru spælarar, sum felagið hevur uppalt. Tað vísir seg at vera torført at fáa føroyingar vestur fyri eina rímiliga upphædd, og tí velja vit hesa loysnina, sigur hann.

32 ára gamli Clayton Soares, Brasil, er framherji. Hann kom til Føroya og FS Vágar í 2002. Hann hevur fyrr skotið eina rúgvu av málum fyri vágamenn og B71.

26 ára gamli Tamba Yarjah, Sierre Lione, er framrættaður miðvallari. Hann spældi við 07 Vestur seinnu kappingarhálvu í 2009, tá vágamenn fluttu niður úr bestu deildini. Hann stóð seg væl, men valdi ikki at halda fram í felagnum.

24 ára gamli Badara Diedhiou, Senegal, spældi við B68 í 2008 og 2009. Hann er verjuleikari og miðvallari.

07 Vestur boðaði frá í vetur, at Tehe Aristide, Fílabeinsstrondin, skiftir úr AB til 07 Vestur, umframt at Jovan Radinovic-Panic heldur fram.

Jógvan Hendrik Samuelsen hevur góðar vónir um at røkka málsetninginum, sum er at varðveita sætið í bestu deildini.

*uni@sosialurin.fo*